*Juni 2009*

# KST C
# (kunningar- og samskiftistøkni)

## 1. Endamál

Endamálið er, at næmingurin mennir hugburð og vitan um tann týdningin, sum KST hevur fyri tann einstaka, vinnulívið og samfelagið. Næmingurin skal menna førleika sín fjølbroyt at nýta KST sum samskiftis- og leitingaramboð. KST er eitt sera týðandi amboð í samlaðu læringartilgongdini, og tí skal lærugreinin stuðla undir læring við og nýtslu av KST í øðrum lærugreinum í útbúgvingini eins og í útbúgvingini í sínari heild.

## 2.0 Førleikamál

*2.1 Munnligur táttur*

Mál fyri undirvísingini er:

- Ogna sær greitt orðatilfar um KST
- Duga at orða seg greitt um ymisk ítøkilig KST fyribrigdi
- Kenna viðkomandi forrit, ið verða nýtt í handilsligum og umsitingarligum høpi
- Greiða frá, hví og hvussu ymisk forrit eru hóskandi til ymisk endamál
- Kenna heitini á vanligum tólbúnaði.

*2.2 Skrivligur táttur*

Mál fyri undirvísingini er:

- Duga í greiðum máli skrivliga at orða seg um ymisk KST fyribrigdi
- Duga at nýta ymisk samskiftisforrit í verki
- Duga at nýta testviðgerð
- Duga at nýta rokniark
- Læra at nýta blindskrift.

*2.3 Samansettur táttur*

Mál fyri undirvísingini er:

- Kenna høvuðstættir innan lóggávuna um KST
- Meta um trygdarviðurskifti á netinum og forrit knýtt at hesum
- Meta um nýtsluvirðið av ymiskum KST-amboðum
- Hava kunnleika til simuleringsforrit, sum verða nýtt í undirvísingarhøpi
- Duga at handfara ymisk KST-amboð
- Duga at velja hóskandi forrit til ymiskar uppgávur.

*2.4 Mentanarligur táttur*

Mál fyri undirvísingini er:

- Vitan um grundleggjandi, viðurkend etisk sjónarmið viðvíkjandi netsamskifti
- Duga við umhugsni at meta um leikutin hjá KST í mentanarligum og samfelagsligum høpi
- Kenna søguna um KST og um framtøku og útbreiðslu tess
- Duga at orða seg um fyrimunir og vansar í vali av ymiskum KST loysnum
- Hava kunnleika um fjølmiðlar og um leiklutin hjá KST í hesum høpi.

## 3.0 Tilfar

*3.1 Kjarnuøki*

- *Handfaring av stýrikervinum*
  Duga grundleggjandi funksjónir í stýriskervinum, eitt nú at stovna mappur og flyta tær, og at handfara fílur. Duga neyðug faklig heiti á enskum.
- *Knappaborð*
  Arbeitt verður við at nýta blindskrift, so næmingurin ognar sær neyðuga skriviferð og neyðugan skrivineyvleika.
- *Arbeiðsumhvørvi*
  Hava holla vitan um ymiskar arbeiðsstøður (ergonomi), so slippast kann umdan arbeiðsskaðum, og trivnaðurin økjast (umhvørviskringlan).
- *Rokniark*
  Arbeitt verður við grundleggjandi frymlum í rokniarki. Duga at gera grafisk diagramm. Duga at nýta týðandi funksjónir, so styrkin í rokniarki verður nýtt.
- *Tekstviðgerð*
  Arbeitt verður við, hvussu tekstur verður skipaður og settur upp. Arbeiðast skal við teimum mest nýttu funksjónunum í tekstviðgerðarforritum, her ímillum snarfunksjónir, so næmingurin lærir at nýta einfaltari arbeiðsgongdir.
- *Myndaviðgerð*
  Arbeitt verður við at viðgera myndir á einfaldan hátt.
- *Samskifti*
  Arbeitt verður við innanhýsis og uttanhýsis samskifti serliga við atliti at viðurskiftunum í einum virki. Skjalprógvan av arbeiðsgongdini í einum virki. Ymisk oyðubløð í hesum høpi. Innanhýsis mannagongdir (skrásetingar). Atburður í ymiskum samskiftishøpum.
- *Heimasíður*
  Duga við umhugsni og vitan at meta um snið, innihald og dygd í heimasíðum.
- *Leitiforrit*
  Duga at nýta ymiskar leitimaskinur í ymiskum høpi og vandaliga at meta um leitingarúrslit.
- *Framløguforrit*
  Kenna grundfunksjónir í framløguforriti og duga at nýta forritið í sambandi við framløgu.
- *First Class*
  Arbeitt verður við í undirvísingarhøpi at nýta týðandi funksjónir í First Class, eitt nú postkassa, kalendara og stevnur, og at gera einfaldar heimasíður í First Class.

Til samans verða í útbúgvingini lisnar einar 150 ns, og samlaða undirvísingartíðin til KST-partin í útbúgvingini er 105 klokkutímar í hvørjum flokki.

KST er hjá fulltíðarnæmingi í stóran mun ein samansjóðaður (integreraður) partur av undirvísing og próvtøku í einari ella fleiri lærugrein/um ella í einari verkætlan.

KST er hjá stakgreinalesandi og sjálvlesandi ein sjálstøðug lærugrein. Undirvísingin skal í hesum føri altíð fevna um arbeiði við stakdømi (case) í umleið 8 klokkutímar.

**4.0 Eftirmetingar**

Munnliga og skrivliga úrslitið hjá tí einstaka næminginum verður javnan eftirmett, so KST framtøkan hjá einstaka næminginum gerst sjónlig.

Um KST er samansjóðaður partur av einari ella fleiri lærugreinum, verður eftirmett við støði í evni næmingsins at nýta KST í fakligum høpi. Í hesum føri verður KST ikki próvtøkulærugrein, men verður partur av møguligari próvtøku í øðrum lærugreinum.

### 4.1 Ávegis eftirmetingar

Fyri at kunna næmingin um fakliga støðið verður fakliga KST úrslitið og fakliga framtøkan í nýtslu av KST javnan eftirmett. Eftirmetingin er munnlig ella skrivlig, men eftirmetingin verður latin næminginum skrivliga.

### 4.2 Próvtøka

Próvtøkan kann fara fram á tveir hættir:

a) Próvtøkuháttur A verður nýttur, tá ið stakgreinalesandi og sjálvlesandi skulu til próvtøku. Talan er um eina einsæris próvtøku við støði í einari verkætlan, har próvtakarin fær eitt próvtal.
b) Próvtøkuháttur B verður nýttur, tá ið talan er um eina samlaða undirvísingargongd í FHS-útbúgvingini ella um eina samlaða undirvísingargongd 1. árið í einari 3 ára HH-útbúgving. KST er ein samansjóðaður (integreraður) partur av próvtøkuni í einari ella fleiri lærugrein/um ella í einari verkætlan í hesum høpi.

### 4.3 Próvtøkuháttur A

Stakgreinalesandi og sjálvlesandi fara til einstaklingaprótøku í einari verkætlan, ið er skipað sum stakdømi (case), og sum próvtakarin hevur gjørt einsæris ella í bólki. 3 próvtakarar verða próvhoyrdir um tíman, íroknað útflýggjan av próvtøkuspurningi, tilfari og próvdøming.

Í dømingini verður dentur lagdur á, at próvtakarin í sínum arbeiði við verkætlanini dugir at nýta KST sum amboð, bæði tá ið tað snýr seg um at finna fram upplýsingar, at gera verkætlanina og at leggja fram úrslitið av sínum arbeiði, umframt at próvtakarin hevur rokkið málunum í lærugreinini.

Eitt próvtal verður givið fyri samlaða avrik próvtakarans við støði í einari heildarmeting.

### 4.4 Próvtøkuháttur B

Fulltíðarnæmingar fara til próvtøku í KST, ið er samansjóðaður (integreraður) partur av próvtøkuni í einari lærugrein/verkætlan í FHS-útbúgvingini ella í 3 ára HH-útbúgvingini, og einki serstakt próvtal verður givið í KST.

Samansjóðaða próvtøkan er ein bólkaprótøka, har bólkurin leggur fram samlaðu verkætlanina. Framløgan varir umleið 10 minuttir. Við støði í felagsframløguni, sum próvhoyrari og próvdómari kunnu seta spurningar til, verður síðani einstaki próvtakarin próvhoyrdur einsæris í verkætlanini, uttan at hinir bólkalimirnir eru hjástaddir. 3 próvtakarar verða próvhoyrdir um tíman, íroknað útflýggjan av próvtøkuspurningi, tilfari og próvdøming.

Í dømingini verður dentur lagdur ár, at nýtslan av KST hevur verið ein virkisligur (funtionellur) partur av samlaða arbeiðnum í lærugreinini/verkætlanini, og at hetta sæst aftur í bólkaframløguni. Einstaki próvtakarin skal vísa, at hann hevur brúkt ymisk KST-amboð, ið eru lagað eftir teimum ymisku tættunum í lærugreinini/verkætlanini, umframt at hann hevur rokkið málunum í avvarðandi lærugrein.

Eitt próvtal verður givið fyri samlaða avrikið í lærugreinini/verkætlanini hjá einstaka próvtakaranum við støði í einari heildarmeting.

**5.0 Didaktiskir arbeiðshættir**

Leiðsla skúlans sær til, at ein serkønur KST-lærari verður knýttur at hvørjum flokki/toymi, so KST verður samansjóðaður (integreraður) partur av undirvísingini í lærugreinunum. Serkøni KST-lærarin hevur saman við lærarunum í avvarðandi lærugreinum ábyrgdina av, at KST tættirnir verða samansjóðaðir í lærugreinunum, so synergi fæst millum KST og lærugreinirnar.

Leiðsla skúlans sær til, at teir 105 klokkutímarnir í KST verða tillutaðir lærugreinunum/toymunum sambært ætlan og eftir tørvi.

Við støði í arbeiðsætlan fyri bólkin skulu tættirnir í KST samansjóðast við tættum í avvarðandi lærugrein/um, so næmingurin fær eina greiða vitan um, at KST er eitt týðandi arbeiðsamboð, ið er við til at smidliggera læring og samskifti, og at KST er týðandi táttur í gerandisdegnum hjá vinnulívinum og í lestrarhøpi.

Í arbeiðinum við verkætlanini skal síggjast til, at næmingarnir hava møguleika fyri at nýta flest allar tættir innan kjarnaøkini, so teir fáa natúrliga venjing í ítøkiliga at nýta og skifta millum ymisk KST-amboð.